

*Johan K. K. Møller var kontrollørur í Føroyingahavnini. Hann var beinasamur, men fylgdi boðunum um at forða fyri sambandi millum føroyingar og grønlendingar*

Aftaná var rættuliga prátað saman, og hetta góða lagið helt fram, eftir at vit vóru komnir umborð aftur. Vit tørnaðu ikki inn fyrr enn á midnátt, hóast skiparin boðaði frá útpurring longu kl. fimm.

## Landingin

Morgunin eftir fóru vit so at landa fiskin yvir í saltdamparan. Vit landaðu til kl. 10 um kvøldið, og byrjaðu so aftur næsta morgun kl. fýra.

Kl. 6 seinnapartin var lastin landað, og salt var komið umborð. So var eftir at fylla vatntangan og taka nakað av útgerð umborð av okkara goymslu.

Vatnið fingu vit úr einum vatni við bránaðum ísi. Tað skuldi fyllast í tunnur. Vit fraktaðu vatnið við báðum bátum, har tað var pláss fyri tveimum tunnum í senn. Hetta var tungt arbeiði, men á midnátt var klárt at fara avstað aftur.

Tíverri mátti fráferðin útsetast vegna mjørka. Tað kundi nevniliga vera vandamikið at fara framvið Svartasker, sum liggur í innsiglingini. Hetta gav tó eyka frívakt. Men fyrrapartin kláraði í, og so var tað farvæl til Føroyingahavnina á hesum sinni.

## Aftur á veiðu

Vit sigldu 100 fjórðingar norður eftir til Lítla Hellufiskabanka, har Justines fekk nógvan fisk í 1927. Vit vóru spentir uppá, um vit fóru at fáa flotfisk, sum er uppi í vatnskorpuni. Flotfiskur hevði givið teimum góða veiðu í 1927. Tað gekk okkum á sama hátt. Vit flutu bókstaviliga í toski, og vit sóu eisini fjaðrarnar á fiskinum í vatnskorpuni. Her var eisini fult av fugli, sum havhestur, rita og havskrápur, sum alt smakkar væl og kom væl við sum avveksling fyri fisk.

Hvørja ferð vit høvdu fylt bátin tóku vit fugl við glúpinum.

Fyrsta triðingin av august fylgdu vit flotfiskinum, til hann hvarv med alla. Hesa tíðina fimgu vit 130 skippund, umleið ein fjórðing av lastini.

Tað vóru serliga tey skip, sum róðu við bátum, ið fingu gleði av hesi spennandi veiðu. Men hetta var eisini strævið, tá vit kundu fylla bátin tvær ferðir innan fimm tímar, og fiskurin skuldi blakast upp á skipið.

Nærmasti grunnurin var Stóra Hellufiskabanki, har vit fiskaðu á 200 metra dýpi. Veiðan sunnari í Grønlandi var annars tarnað av ísi.

Vit høvdu bert fáar dagar við rættiligum summarveðri, og ofta gjørdi tokan, at vit ikki kundu fara nakran veg. Vandi var jú fyri, at vit ikki funnu aftur til skipið. Ofta var tó av besta veðri inni í skergarðinum inni við land.

Tað vóru tó eisini stak góðir dagar inn í millum. Vit sóu nú aftur onnur skip, og nú vóru fjøllini eisini kavaklødd. Veðrið kundi skifta frá kavarok til sól innan sama samdøgur. Tað var tó væl av fiski.

## Inn aftur til lands at heinta ber

Vit fara aðru ferð inn til lands. Vit sigldu framvið eini koppaðari doryu. Tað vóru tíðindi um, at tær portugisisku skonnartirnar høvdu mist nógvar mans í ringa veðrinum.

Okkara kort var frá 1921 og kundi sum so væl brúkast. Tað var tó ófullfíggjað innanskers, sum vit sóu ein dagin við Cook oyggjarnar nærindis Godthaab.

Tað var sunnudagur 16. september, og vit fóru í land at heinta ber, sum tað var nógv til av. Tey vóru stór og vælsmakkandi. Vit fingu okkum, til vit ikki orkaðu at eta meira, og síðan fyltu vit eisini uppí øll íløt at hava við aftur umborð.

Á veg út aftur rendu vit á eitt riv og blivu sleipaðir út aftur av øðrum skipum. Eingin skaði hendi sum so, men tá ið skipið seinni kom uppá beding sást, at strákjølurin var farin. Strákjølur var eitt slag av eykakjøli sum skuldi verja sjálvan kjølin.

Vit fóru út aftur og fiskaðu væl beint við 3 fjórðingamarkið. Men hetta endaði knappliga, tá verjuskipið Maagen kom og rak okkum burtur, tí vit skuldu havt verið innanfyri mark.

Vit fóru tískil út á Fylla Banka.



*Báturin hjá kontrollørinum*

## Við at mangla proviant

Á vegnum fóru vit inn til Godthaab at keypa eitt sindur av provianti, men hetta lat seg ikki gera. Kongaligi Grønlendski Handilin hevði ikki meira vøru enn tað skuldi nýtast yvir veturin á staðnum, til skip kom aftur úr Danmark. Øll søla til fremmand var tí bannað.

Hetta kom illa við. Vit høvdu longu í tríggjar vikur ikki havt eplir, og nú var skjótt liðugt við amerikanska kjøtinum. Vit høvdu nóg mikið av fiski, keks og ymiskum feitti.

September var við at halla og saltið var liðugt. Hugurin umborð minkaði so hvørt, sum minni og minni var at heinta í proviantrúminum. Tá ið breyðið gekk undan, og tað heldur ikki var nøkur blikkamjólk at koyra í te og kaffi, gjørdist lagið enn verri.

Vit fóru so at sigla heim, og Møller kom umborð at siga farvæl. Hann sendi eisini telegram heim, um at vit siglu heim. Tá vóru bert fimm skip eftir undir Grønlandi.

## Klárt til heimferð

Tá vit vóru móti endanum á túrinum, kom fjáltur á menninar. Teir stúrdi fyri, hvat ið kundi henda seinast á túrinum, og arbeiðshugurin gjørdist verri. Summir fóru at drekka kókað vatn við sukur í heldur enn te og kaffi.

Tað var eisini illa dámt, at skiparin hevði tikið barometrið úr lugarinum og hongt tað í kahúttina. Tað var jú vanligt ítriv hjá manningini í lugarinum at fylgja við barometurstandinum. Men skiparanum dámdi ikki, at menn bankaðu á baromtrið fyri at síggja hvønn veg vísarin fór.

Tá menninir, sum vóru við í 1927, greiddu frá hungursneyðini, bøtti hetta heldur ikki um lagið, tí hetta var kanska eisini tað, sum var okkum í vænti.

Nú kom eisini rættuliga fram munurin millum teir royndu gomlu og teir óroyndu ungu, har teir fyrru hevjaðu seg yvir teir ungu við teirra vitan um sjómansskap. Tann elsti umborð var annars 61 ár og tann yngsti 18.

Stúrt varð eisini fyri at fara framvið Kappanum, sum ikki altíð var nakar gamansleikur, sum eftirtíðin eisini hevur víst.

Men sum frá leið gjørdist lagið betri umborð, og góðu viðurskiftini vóru endurskapað.

Hóast ferðin á skipinum var hampilig, gekk tíðin sera seint. Á yvirreisini høvdu verið ymisk ítriv, men hetta var longu avgreitt á túrinum.

Okkurt máttu vit hava at práta um útyvir at spyrja eftir barometrinum, og hvussu nógvir fjórðingar vóru komnir á loggið hvørja vakt.



*Føroysk skip í Føroyingahavnini, har tey løgdu útgerð og veiðu upp, meðan tey fiskaðu í Grønlandi*